# Løgtingsvalið 30. apríl 2002
## og Løgtingsvalið 30. apríl 1998

*Runavík er nýtt valstað. Samanteljingin 1998 er fyri valstøðini: Glyvrar, Lamba, Rituvík, Søldarfjørð og Æðuvík.

| | Fólkaflokkurin A 2002 | A 1998 | Sambands flokkurin B 2002 | B 1998 | Javnaðarflokkurin C 2002 | C 1998 | Sjálvstýris flokkurin D 2002 | D 1998 | Tjóðveldis flokkurin E 2002 | E 1998 | Kr. Fólkaflokkurin F 1998 | Miðflokkurin H 2002 | H 1998 | Verkamannafylkingin I 1998 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyar:** | | | | | | | | | | | | | | |
| 1. Árnafjørður | | 9 | | 4 | | 3 | | 5 | | 17 | 10 | | 0 | 0 |
| 2. Fossanes | | 79 | | 19 | | 37 | | 14 | | 50 | 47 | | 10 | 13 |
| 3. Haraldssund | | 1 | | 1 | | 3 | | 1 | | 38 | 0 | | 0 | 0 |
| 4. Hattarvík | | 7 | | 0 | | 2 | | 1 | | 6 | 0 | | 0 | 0 |
| 5. Húsar | | 3 | | 4 | | 10 | | 0 | | 7 | 2 | | 0 | 0 |
| 6. Kirkja | | 0 | | 1 | | 3 | | 9 | | 2 | 0 | | 0 | 0 |
| 7. Klaksvík | | 816 | | 225 | | 530 | | 338 | | 749 | 205 | | 51 | 6 |
| 8. Kunoy | | 6 | | 0 | | 5 | | 3 | | 29 | 0 | | 0 | 0 |
| 9. Mikladalur | | 9 | | 1 | | 19 | | 0 | | 18 | 1 | | 0 | 0 |
| 10. Svínoy | | 22 | | 12 | | 1 | | 0 | | 7 | 1 | | 0 | 0 |
| 11. Syðradalur | | 0 | | 1 | | 3 | | 0 | | 3 | 0 | | 0 | 0 |
| 13. Viðareiði | | 95 | | 7 | | 31 | | 14 | | 31 | 9 | | 1 | 0 |
| **Tilsamans** | | **1047** | | **275** | | **647** | | **385** | | **957** | **277** | | **62** | **19** |
| **Eysturoy** | | | | | | | | | | | | | | |
| 14. Eiði | | 28 | | 56 | | 43 | | 10 | | 104 | 10 | | 138 | 0 |
| 15. Elduvík | | 1 | | 9 | | 12 | | 0 | | 0 | 0 | | 1 | 0 |
| 16. Fuglafjørður | | 263 | | 147 | | 165 | | 61 | | 265 | 13 | | 14 | 4 |
| 17. Funningsfjørður | | 2 | | 8 | | 6 | | 2 | | 16 | 3 | | 0 | 0 |
| 18. Funningur | | 10 | | 3 | | 18 | | 11 | | 17 | 3 | | 2 | 5 |
| 19. Gjógv | | 9 | | 8 | | 3 | | 2 | | 20 | 2 | | 1 | 0 |
| 20. Glyvrar | | 136 | | 205 | | 78 | | 180 | | 160 | 90 | | 59 | 7 |
| 21. Gøta | | 127 | | 124 | | 115 | | 74 | | 80 | 4 | | 25 | 6 |
| 22. Hellurnar | | 1 | | 4 | | 5 | | 1 | | 6 | 0 | | 0 | 0 |
| 23. Lamba | | 8 | | 27 | | 8 | | 14 | | 5 | 5 | | 8 | 0 |
| 24. Leirvík | | 184 | | 52 | | 94 | | 31 | | 133 | 31 | | 8 | 2 |
| 26. Oyndarfjørður | | 26 | | 21 | | 26 | | 11 | | 17 | 1 | | 0 | 0 |
| 27. Oyrarbakki | | 31 | | 120 | | 41 | | 21 | | 33 | 0 | | 9 | 4 |
| 28. Rituvík | | 6 | | 62 | | 7 | | 28 | | 42 | 22 | | 1 | 2 |
| 29. Runavík* | | (208) | | (327) | | (101) | | (341) | | (248) | (137) | | (72) | (14) |
| 30. Selatrað | | 14 | | 24 | | 3 | | 3 | | 22 | 1 | | 2 | 0 |
| 31. Skála | | 29 | | 74 | | 130 | | 43 | | 56 | 3 | | 16 | 3 |
| 32. Skálafjørður | | 0 | | 3 | | 14 | | 10 | | 9 | 2 | | 7 | 0 |
| 33. Strendur | | 89 | | 202 | | 76 | | 43 | | 57 | 7 | | 24 | 0 |
| 34. Søldarfjørður | | 52 | | 27 | | 8 | | 108 | | 32 | 5 | | 4 | 5 |
| 35. Toftir | | 63 | | 350 | | 62 | | 45 | | 94 | 27 | | 34 | 3 |
| 36. Æðuvík | | 6 | | 6 | | 0 | | 11 | | 9 | 15 | | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | | **1085** | | **1532** | | **914** | | **709** | | **1177** | **244** | | **353** | **42** |

# Løgtingsvalið 7. juli 1994

| | Fólkaflokkurin | Sambandsflokkurin | Javnaðarflokkurin | Sjálvstýrisflokkurin | Tjóðveldisflokkurin | Kr. Fólkaflokkurin | Føroyski flokkurin | Miðflokkurin | Verkamanna-fylkingin | Frælsisfylkingin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyar:** | | | | | | | | | | |
| 1. Árnafjørður | 8 | 4 | 3 | 3 | 12 | 11 | 1 | 0 | 2 | 0 |
| 2. Fossanes | 57 | 42 | 28 | 13 | 40 | 55 | 1 | 9 | 12 | 4 |
| 3. Haraldssund | 2 | 1 | 0 | 0 | 34 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4. Hattarvík | 4 | 3 | 4 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 6 |
| 5. Húsar | 3 | 5 | 4 | 0 | 5 | 1 | 0 | 0 | 7 | 0 |
| 6. Kirkja | 0 | 3 | 4 | 10 | 1 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 7. Klaksvík | 592 | 341 | 340 | 418 | 520 | 319 | 52 | 64 | 65 | 41 |
| 8. Kunoy | 2 | 2 | 2 | 2 | 29 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5 |
| 9. Mikladalur | 8 | 3 | 11 | 0 | 22 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 |
| 10. Svínoy | 15 | 12 | 4 | 0 | 8 | 2 | 1 | 2 | 0 | 0 |
| 11. Syðradalur | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| 13. Viðareiði | 74 | 9 | 33 | 12 | 22 | 8 | 1 | 8 | 4 | 3 |
| **Tilsamans** | **765** | **426** | **434** | **459** | **694** | **403** | **56** | **83** | **94** | **59** |
| **Eysturoy** | | | | | | | | | | |
| 14. Eiði | 33 | 72 | 33 | 12 | 34 | 22 | 2 | 122 | 22 | 1 |
| 15. Elduvík | 1 | 10 | 10 | 0 | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 |
| 16. Fuglafjørður | 140 | 171 | 84 | 19 | 171 | 30 | 42 | 35 | 89 | 8 |
| 17. Funningsfjørður | 1 | 5 | 6 | 0 | 6 | 6 | 1 | 2 | 0 | 2 |
| 18. Funningur | 11 | 6 | 9 | 13 | 14 | 6 | 1 | 3 | 8 | 0 |
| 19. Gjógv | 3 | 7 | 2 | 0 | 16 | 2 | 14 | 3 | 0 | 0 |
| 20. Glyvrar | 112 | 205 | 64 | 67 | 86 | 129 | 8 | 60 | 75 | 12 |
| 21. Gøta | 100 | 153 | 60 | 25 | 40 | 7 | 6 | 50 | 81 | 4 |
| 22. Hellurnar | 1 | 3 | 4 | 5 | 4 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 23. Lamba | 3 | 27 | 2 | 16 | 2 | 12 | 2 | 6 | 6 | 0 |
| 24. Leirvík | 233 | 50 | 41 | 10 | 52 | 17 | 4 | 15 | 25 | 4 |
| 26. Oyndarfjørður | 13 | 28 | 27 | 15 | 12 | 3 | 2 | 1 | 9 | 0 |
| 27. Oyrarbakki | 11 | 131 | 17 | 11 | 17 | 5 | 5 | 16 | 30 | 1 |
| 28. Rituvík | 1 | 48 | 2 | 9 | 27 | 38 | 1 | 12 | 24 | 0 |
| 29. Runavík* | | | | | | | | | | |
| 30. Selatrað | 4 | 24 | 1 | 0 | 6 | 11 | 2 | 4 | 11 | 4 |
| 31. Skála | 29 | 81 | 82 | 16 | 22 | 20 | 3 | 17 | 48 | 9 |
| 32. Skálafjørður | 0 | 5 | 2 | 0 | 5 | 5 | 1 | 11 | 10 | 0 |
| 33. Strendur | 53 | 195 | 32 | 27 | 35 | 36 | 11 | 32 | 61 | 7 |
| 34. Søldarfjørður | 33 | 27 | 6 | 51 | 21 | 11 | 2 | 33 | 26 | 7 |
| 35. Toftir | 30 | 286 | 25 | 24 | 50 | 71 | 5 | 48 | 75 | 14 |
| 36. Æðuvík | 0 | 3 | 0 | 0 | 1 | 12 | 6 | 0 | 10 | 0 |
| **Tilsamans** | **812** | **1537** | **509** | **320** | **623** | **445** | **118** | **472** | **610** | **73** |



## VALGREINAR

# Heilt erligt

**Randi í Jógvanstovu**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Teir koma sær væl, tað noyðast vit so at geva teimum. Men at viðganga at tað sum er ætlað til ta føroysku vælferðina er sett inn á bók, tá verður tað ein spurningur um ein er djarvur ella bara bedøvandi líkaglaður við síni medmenniskju.

Tá menn eru á fjalli og gingið verður har illgongt er, kann verða ógvuliga stutt ímillum hvat er skilagott og hvat er býtt. Kann henda, tú fært seyðin í rætt, men um prísurin er at tú grýtur hinir undir í gróti og bøkkar, verður prísurin heldur høgur.

Landspolitikkararnir hava ábyrgd av, at vit øll verða væl røkt, eins og seyðirnir hjá fjallmonnunum. At teir ynskja allan seyðin í rætt, ger tað ikki líkamikið hvussu teir bera seg at.

Nei – nei loysingarmenn, at ganga ytst á tromini er ikki prógv fyri dirvi aleina, men eisini prógv fyri, at ein gloymir at brúka skynsemi.

Vit hava brúk fyri samstarvi innan fyri Ríkisfelagsskapin.

Veljið Javnarðflokkin, so tryggja vit samstarv.

# Góði veljari

**Edva Jacobsen**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Sum valevni fyri Sambandsflokkin vendi eg mær til tykkara við áheitan um stuðul týsdagin tann 30.04.2002.

Valið hesaferð- kanska meira enn nakrantíð- kann gerast eitt lagnu val, sum kan leiða føroyaka fólkið út í eina vanlukkuliga støðu, um ávísir flokkar koma til valdið.

Høvuðsevnið til valið hesaferð verður um vit skulu hava loysing ella samband.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur sum 100 % ynskir at varðveita ríkisfelagsskapin við Danmark. Summir flokkar virka ógvuliga sambandssinnaðir upp undir val men aftaná kl. 20.00 týskvøldið tann 30.4 tá valið er av, fara teir aftur í loysingarhamin. Fyri okkum sambandsfólk er felagsskapurin við Danmark meir enn bara krónur og oyrir. Londini bæði hava verið í felagsskapi í fleiri 100 ár, og hetta eru bond, sum ikki kunnu kvettast. Bæði kanningar í Føroyum og í Danmark vísa, at fólkini í báðum londum vilja varveita og styrkja felagsskapin millum londini bæði.

Ein atkvøða fyri sambandsflokkin er ein atkvøða fyri: Ríkisfelagskapi Tryggleika Persónligum frælsi

Sambandsflokkurin hevur sum mál, av vit í Føroyum skulu hava sama livistøði sum hini norðanlondini. Her verður hugsa um umstøðurnar hjá teimum gomlu, teimum veiku, teimum ungu barnafamiljunum, teimum sum skulu lesa, ja hjá øllum føroyingum.

Tað hevur verið ført fram, at liviumstøðurnar í Føroyum ikki fara at lække, men fara at vera á sama støði, um vit loysa. Tá vit sambandsfólk spyrja loysingarfólkini, hvar 1,2 milliardin, sum kemur úr Danmark skal koma frá, hava teir einki svar. Hetta er ikki so løgið, tí her er onki svar. Av og á sigur onkur tó, at vit skulu líta á egna megi og mátt, ( summi siga enntá at flagga reint), men tað gevur mær vitandi ikki so nógv margarin uppá breyði.

TÍN atkvøða hevur týdning Vel trygt - vel sambandsflokkin

Takk fyri góðan stuðul!!

# Demagogisk ræðuherferð hjá tjóðveldinum

**- tjóðveldið trýr at hvør maður stjelur, men at tøma landskassan dugir ongin so væl sum teir sjálvir!**

**Hans Pauli Strøm**
*javnaðarvalevni í Norðstreymi*



Vit hava hoyrt útvarpslýsingarnar hjá tjóðveldinum, har teir bjóðaðu til fundar um hvussu teir skulu forða hinum flokkunum í at tøma landskassan. Og tað er væl skilligt, tí Tjóvur trýr at hvør maður stjelur!

Tjóðveldismenn sipa ofta til 80-ini í tí sambandinum. Tá áttu teir landsstýrismannin í fíggjarmálum tey heitastu árini í 80-unum, sum útskrivaði gummikjekkar til høgru og vinstru úr tómum landskassa.

Tjóðveldismenn sipa ofta til ábyrgdarleysan studningsbúskap, og vísa serliga til studningin til fiskivinnuna. Men tað vóru tjóðveldismenn í landsstýrinum og í fyrisitingini sum mitt í 70-unum við ráfiskagrunninum uppfunnu og útviklaðu tað mest vitleysu studningsskipan, sum heimurin nakrantíð hevur sæð.

Og nú í fýra ár hava tjóðveldis- og fólkafloksmenn brúkt landskassan til at fíggja politiskt propagandavirksemi. Og allarfúlast: eisini til at fíggja teirra partapolitiska valflesk uppundir løgtingsvalið - ikki við nøkrum fáum túsund krónum, nei við nógvum tíggjutalsmiljónum, beinleiðis úr landskassanum.

Tað sum fekk meg til at skriva hesar reglur, var røðan sum varð hildin á flaggdagshaldinum her í Vestmanna. Har tók tjóðveldisrøðarin uppaftur hesar ræðumyndirnar úr demagogisku útvarpslýsingunum hjá Tjóðveldisflokkinum, og ávaraði fundarfólkið móti hesum fólkunum, sum bara vilja framat at tøma landskassan. Her kyndi hon undir hesa demagogisku stemplingina av ávísum flokkum. Haldi tað vera ódámligt at neyðtaka eitt alment tiltak sum flaggdagshaldið til partapolitiska propagandu.

Haldi tó eisini, at vestmenningar duga á at skyna, hvussu væl ymiskir flokkar og samfelagsbólkar duga at tøma landskassan.

# Framtíðin er tín

**Ása Olsen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreym*



Ynskir tú eitt samfelag, har trivnaður hins einstaka verður settur í hásætið? Har barnafamiljurnar hava liviligar umstøður? Har tey, ið sleptu har vit tóku við fáa eitt virðiligt lívskvøld? Har sjúkrahúsverkið fær liviligar karmar? Har lógir landsins verða gjørdar við støði í kristnu trúðarlæruni? Har persónligt frælsi verður sett í hásætið?

Ja eitt samfelag, har øll bæði ung og gomul fáa mansømuligar umstøður, so er rættast at velja ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á ting.

# Einlig mamma missir dóttrina

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Fríggjadagin ringdi ein einlig mamma til mín. Hon býr í einari trongari íbúð í Havn. Mamman og dóttirin búgva í sama kamari í trongu íbúðini.

Tað gera tær, tí mamman ikki hevur ráð til at gjalda teir okursprísir, sum eru á íbúðum.

Nú er tað so, at pápin flytir av bygd til Havnar. Pápin er fíggjarliga væl fyri og keypir sær hús. Dótturin, sum er 14 ára gomul, hevur tann eina dagin vitjað pápan og kemur aftur og vil flyta til hansara. Tí har kann hon fáa egið kamar.

Hugsað tær støðuna hjá mammuni, sum hevur verið um dóttrina alt lívið. Nú missir hon hana, tí íbúðarviðurskiftini í Havn eru so vánalig. Einasta eg kundi gera, var at venda henni til barnaverndina.

Hetta er støðan á íbúðarmarknaðinum í Havn og nógva aðrastaðni í dag. Eingin hugsar um, at tað búgva onnur í Havn enn ríkir menn og ríkar familjur. Men her búgva also eisini einligir forsyrgjarar, ungar familjur uttan eina millión í lummanum. Her búgva eisini lesandi, eldri pensjonistar og brekað, sum ongan møguleika hava at gjalda teir prísir, sum nú eru á íbúðarmarknaðinum í Havn.

Javnaðarflokkurin fer at leggja til brots við einum almennum íbúðarpolitikki, sum ger tað áhugavert hjá kommunum, almennum felagsskapum, fakfeløgum, eftirlønargrunnum, lívstryggingum o.ø., at byggja leiguíbúðir.

Treytirnar til slíka bygging skulu verða, at leigarin kann leiga fyri ein sámuligan kostnað.

Vit skulu eisini tryggja rættindi hjá leigarum, sum í dag eru nærum rættarleysir. Leigarar skulu tryggjast við veruligari leigulóg.

Legg eisini til merkis, at í tinginum sita 28 menn og 4 kvinnur. Hetta kann vera ein av høvuðsorsøkunum til, at so lítið verður hugsað um trivnaðarmál, sum íbúðarviðurskifti, barnaansing og eldramál.

Latið okkum tí fara á val og velja Javnaðarflokkin, setið kross við lista C. Setið kross við eina kvinnu. So vit eisini fara at hugsa um einligu forsyrgjararnar. Gott Javnaðarval.

www.lindenskov.com